# HEYSTAR-DAGUR VIÐ GJÓGV



Frá vinstru: Hanus Ingi, Tummas, Heðin og Alén

**Tekstur: Snorri Brend**

*Myndir: www.bygdin.fo*

Gjøgnum tíðirnar hevur norðasta bygdin á Eysturoynni fostrað mong mentafólkini.

Fleiri teirra hava haraftrat gjørt eitt sera stórt arbeiði við at "foreviga" heimbygdina. Hetta er gjørt millum annað við at skriva bøkur við bygdarsøguni, og við at avmynda gerandisdagin hjá bygdarfólkinum.

Eitt gott mið til at fáa eitt innlit í gerandisdagin norðuri við Gjógv, er við at vitja heimasíðuna www.bygdin.fo, har gjáarmaðurin, Ásfinn Sigvardsen sum er búsitandi í Saltangará, er óførur at lýsa bygdarlívið í myndum.

Við loyvi frá myndamanninum endurgeva vit her nakrar myndir haðani, sum eru tiknar fyrr í mánaðinum - í flestu førum í samband við fjallgongu - við tað at Omanrættarhagi, har Ambadalur er ein partur, verður til tveir hagapartar frá 1. november at rokna.

Nógv gjáarfólk, bæði úr bygd og av bygd, og onnur, vórðu savnað henda dagin.

*snorri@sosialurin.fo*





*Frá vinstru: Óli, Theodor, Símun hjá Sigurdi, Eyðsvein og Eldbjørn*